# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Altjóða ráðstevna um veiðitøkni

Ein einaferð eru Føroyar karmurin um altjóða ráðstevnu. Alla komandi viku verður ráðstevna, har umleið 70 granskarar úr øllum heiminum hittast til fundar í Føroyum.Talan er um arbeiðsbólkin, sum stendur fyri Fishing Technology and Fish Behaviour. Hesin bólkur arbeiðir fyri havgranskingarstovnin FAO, sum er matvørufelagsskapur Sameindu Tjóða. Bólkurin kemur saman eina ferð um árið, vanliga í apríl, at viðgera tekniskar fyrispurningar frá ICES og limalondum tess viðvíkjandi veiðitøkni. Í samband við fundin hevur FAO lagt ein av teirra fundum í Føroyum, og koma t 15 fólk úr tropiskum londum at hava serligan fund um tropiska rækjuveiðu. Hetta er sera jaligt og ein heiður eins væl og ein fyrimunur fyri Føroyar. Vit kunnu ikki yvirmeta týdningin av slíkum altjóða tiltøkum í Føroyum, og tiltøkini eru við til at breiða út kunnleika til føroysk viðurskifti. Slíkar ráðstevnur eru við til at menna netverk av ymsum sløgum, eitt nú innan gransking, vinnu eins og týðandi persónlig og politisk sambond ofta verða skapað.

Torbjørn Jacobsen, landsstýrismaður, segði í mergjaðu setanarrøðu síni í morgun m.a., at politiska skipanin er farin undir eina eftirmeting av allari skipanini sambært lógini um vinnuligan fiskiskap. Hetta er í sjálvum sær áhugavert, og má vera ein almenn ásannan av, at nú kann ikki bíðast longur við øllum hesum máli. Landsstýrismaðurin gjørdi vart við, at í endurskoðanini verður serligt atlit tikið til veiðiorkuna í mun til tað, sum fiskifrøðingar meta kann takast úr teimum ymsu fiskastovnunum á hvørjum ári. Endamálið er áhaldandi at halda fokus á burðardyggari veiði. Víðari legði hann dent á, at burðardygg veiða snýr seg um at framtíðartryggja samfelagið, soleiðis at eftirkomararnir eisini kunna liva eitt virðiligt lív av vinninginum úr egnum sjógvi. Hetta segði hann vera alment galdandi fyri allar heimsins veiðitjóðir. Fokus í endurskipanini er ein tilfeingisbúð, ein fiskidagamarknaður, har veiðirættindi eru til sølu. Veiðirættindini eru sum kunnugt ogn fólksins og liggja harvið ikki í privata økinum, soleiðis sum vit kenna tað úr øðrum londum, segði landsstýrismaðurin.

Hann legði stóran dent á tann týdning granskingin hevur fyri allar partar av fiskivinnuni og serstakliga áhugaverd var fráboðan landsstýrismansins um, at nýtt havrannsóknarskip skal smíðast í staðin fyri Magnus Heinason. Hetta er, sum landsstýrismaður so beint sigur, ein framtíðaríløga í júst tað granskingarøkið, sum hendan ráðstevnan viðger, og vónandi er hetta eisini eitt tekin um, at henda landsstýrissamgongan tekur allan granskingarpolitikkin í neyðugum álvara. Vit kunnu bert geva landsstýrismanninum rætt og leggja afturat, at burðardygg veiðitøkni er ein spurningur um lív og deyð fyri eina og hvørja fiskiveiðitjóð, uttan mun til hvar á klótuni henda tjóð búleikast. Vit eiga við hesum eisini at minnast til tað stóra arbeiði, sum John Smith, sáli legði í nettupp henda so týðandi parting av fiskivinnuni.

**Sosialurin**

## Tøgnin ræður

**PETUR ANDREASEN**
Vestmanna



Vit mongu, sum lesa føroysku bløðini hava fyri langari tíð síðan bitið merki í, at nakrir ávísir eldri skilamenn og kvinnur, javnan skriva í Dimmu og Sosialinum, um ta skilaleysu fíggjarligu stýringina, sum valdar í hesum landi.

Tveir av hesum skilamonnum eru Heri Mohr, fyrrverandi stjóri á Føroya Gjaldstovu og Símun Pauli Jacobsen, fyrrverandi bókhaldari hjá S.E.V.

Hesir skriva altíð sakliga og væl dokumenterað um fíggjarstøðu Føroya og ikki minst um tann vanlukkuliga niðurskurðin av BLOKKINUM.

Símun Pauli hevur grein í bløðunum nú um dagarnar, har hann við tølum ávísur, at hesin niðurskurður higartil hevur kostað føroyska fólkinum hálva triðju milliard krónur, og nú ætlar nýggja fullveldislandsstýrið at skerja blokkin enn meira við heili 120 milliónum krónum avtrat, - aftur ein steinur oman á byrðu!

Vit hoyrdu í Útvarpinum dýra biðidag, at charmeururin Kári P. Højgaard, løgtingsmaður fyri Sjálvstýrisflokkin, gramdi seg um, at ungir føroyingar lesa námsfrøði á alnótini og fara til Danmarkar til próvtøku og er hetta ein stór fíggjarlig byrða at ferðast fram og aftur. Sagt varð, at tað í løtuni lesa 26 næmingar námsfrøði á alnótini. Ein stórur fíggjarligur fyrimunur hevði verið at lisi í DK í staðin fyri í FR.

Kristina Háfoss landsstýriskvinna í mentamálum royndi sum frægast at greiða frá, hvussu komandi fíggjarlóg raðfesti, - livst so spyrt!

Kári P. Højgaard minnist sjálvandi, at Sjálvstýrisflokkurin var við í Fullveldissamgonguni, tá risastóri niðurskurðurin í blokkinum var framdur.

Vit eru mong, ið minnast kendu greinina hjá Torbirni Jacobsen í bløðunum eftir at blokkurin var niðurskorðin, har hann samanbar Høgna Hoydal við lítla "Messias" og í somu grein skrivar, at uppskotið um at niðurskriva blokkin við heili 366 milliónum krónum árliga og fastfrysta dýrtíðarreguleringina av restini av blokkinum í komandi tíð, kom frá "sheriffinum" í Klaksvík og kann hesin sheriffur bert vera Karsten Hansen fyrrverandi sýslumaður í Klaksvík, - táverandi og núverandi landsstýrismaður í fíggjarmálum!

Nú tað aftur fer at sansa at í føroyska búskapinum, sum nógv tekin eru um, hevur Karsten Hansen neyvan nakran fullveldistrumf at rista úr ermuni hesaferð, sum hann hevði tá.

Nú situr hann haraftur-ímóti við Svartaperi, hvussu hann so sleppur av við hann, fáa vit at síggja í komandi tíðum!

Sveiggini í føroyska búskapinum hava altíð verið ógvuliga sjónlig.

Í mínum lívi havi eg upplivað fleiri av hesum sveiggjum.

Mín fyrsti túrur til skips var við skonnart í Grønlandi, har vit fiskaðu frá skipinum við bátum, - hetta var í 1950 og minnist eg, at dagliga bleiv tosað um prísirnar, sum vit komu at fáa fyri saltfiskin, - um vit fingu 52 ella 54 oyru fyri kg, og tað endaði við, at vit fingu 53 oyru, - hampuligur prísur tá.

Hýran hjá mær fyri 5 mánaðir fiskarí var 1.800 krónur.

1.400 krónur blivu settar á bók í Sjóvinnubankan.

Ein dagin hoyrdi eg eitt graml um, at Sjóvinnubankin var við at fara á húsagang og skundaði eg mær til Havnar at taka tær 1.400 krónurnar út úr bankanum.

Dagin eftir fór bankin á húsagang - minnist meg rætt, var hetta í 1951.

Hvør tilkomin føroyingur minnist ikki tíðindini í Sjónvarpinum í Degi og Viku í 1992, tá tveir kendir føroyingar stóðu sum kánus á trappuni á veg inn í Fossbankan og komu til læstar dyr og lósu lítla seðilin á hurðini, har tað stóð, at bankin var fyribils stongdur.

Næsti maður, ið tók í hurðina, var Heri Mohr, ið læs sama seðil og minnist eg, at hann risti við høvdinum og segði: - "Hvat verður tað næsta?"

Stutt eftir hetta var Sjóvinnubankin fyri aðruferð insolventur meðan Føroya Banki helt sær flótandi eina tíð, tí hann hevði "Den Danske Bank" sum høvuðsánara og síðani fór føroyska fíggjarliga skriðan rættuliga á glið.

Úrslitið var m. a. at umleið 7.000 føroyingar máttu rýma av landinum og avlevera lykilin til sítt heim í Sparikassanum og har, sum onnur skuld var.

Flestu av hesum eru ongantíð afturkomin og eru í dag búsett uttan fyri Føroyar, - koma helst ongantíð aftur. Tey flestu settu búgv og klára seg væl.

Vónandi kemur tað ikki at ganga so gali hesaferð!

Kanska eru hesar viðmerkingar bert "gamlamannatos", sum nógv fólk, ið eg tosi við, lata meg vita.

Tað, sum eg vil við hesi grein er at vísa á, at vit eru mong, ið halda at tað er sera løgið, ófólkaligt og niðurgerandi at tey ráðandi ongantíð svara hesum skilagóðu fíggjarligu viðmerkingunum aftur hjá Hera og Símuni Paula. - Bert djúp tøgn!

Tøgnin er kanska eitt av teimum mongu serføroysku fyribrygdunum har danska Jantelógin trívist sera væl.

Vísast kann til skilagóðu Klummuna "Tøgnin rular" hjá blaðkvinnuni Dorit Hansen í seinasta vikuskiftisblaðnum í Sosialinum. Hon skrivar so beinrakið um tøgnina, sum vit føroyingar eru so óførir at goyma okkum aftanfyri.

## »Stikk den«

Tað er eitt moll innbygt
í sjóandi áum
í brimi
í fossaduni
í rennandi streymi.
Tann tungi darrandi
molltónin
rungar
í útnorðingi norðan
í landsynningi
í føroyska dansinum
tí tunga føroyska
stevinum.
Láin letur í moll
spógvin viðhvørt.
Tað dunar eitt cresendo
av molltónum
í hvørjum fuglabergi.
Men beint nú
í hesi løtu
á einum runni
í mínum garði
situr ein vøkur - lítil
kvørkveggja
og syngur í " dur "
"Stikk den"
segði funningsabbin
tá hann gleið í einum
hundalorti
og breyt beinið,
men grípti húgvuni!!

***Valdemar***
***á Løgmansbø***

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen
karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Niels Petersen niels@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.